9. apríl 2012

**Til Føroya Løgting:**
Aksel V. Johannesen, Alfred Olsen, Bárður á Steig Nielsen, Bill Justinussen, Bjarni Djurholm, Bjørt Samuelsen, Brandur Sandoy, Edva Jacobsen, Eivin Jacobsen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Eyðgunn Jana Samuelsen, Gerhard Lognberg, Gunvør Balle, Hanus Samró, Helgi Abrahamsen, Henrik Old, Høgni Karsten Hoydal, Jákup Mikkelsen, Janus Rein, Jenis av Rana, Joen Magnus Rasmussen, Jógvan á Lakjuni, Jógvan Skorheim, Jóna Mortensen, Kristina Háfoss, Kristin Michelsen, Páll á Reynatúgvu, Poul Michelsen, Reimund Langgaard, Rigmor Dam, Rodmundur Nielsen, Rósa Samuelsen, Sirið Stenberg

## Viðmerkingar til ætlanir landsstýrisins um at avtaka Landsbanka Føroya

Í Búskaparfrágreiðing I á s. 50 til uppskot um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013 verður skotið upp, at Landsbanki Føroya verður tikin av, og at uppgávur, ið landsbankin røkir, verða fluttar til Fíggjarmálaráðið, Føroya Gjaldstovu og Hagstovu Føroya.

Leiðsla og nevnd landsbankans fingu vitan um hesa ætlan sama morgun, sum uppskotið varð alment. Tískil verða hesar viðmerkingar sendar løgtinginum. Vónandi kunnu tær verða til nyttuna í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógarkørmunum fyri 2013.

Ætlanin hevur við sær fylgjandi:

1. Umsiting av gjaldføri landskassans verður flutt til gjaldsstovuna
2. Umsiting av lánum landskassans verður flutt til gjaldsstovuna
3. Hagfrøðiligi og búskapargreinandi parturin av virkseminum hjá landsbankanum verður fluttur til hagstovuna
4. Skrivarauppgávan fyri Búskaparráðið verður flutt til hagstovuna
5. Annað búskapargreinandi virksemi av almenna geiranum verður flutt til Fíggjarmálaráðið
6. Mett verður, at sparingin verður 1 mió kr í 2013 og 2 mió kr eftirfylgjandi ár. Tó er eingin verulig kost-nyttu-greining gjørd í sambandi við nevndu sparing

Verða hesar ætlanir framdar, verður landsbankin avtikin - bæði fyrisitingarliga og løgfrøðiliga. Landsbankin mælir løgtinginum frá at fara undir hesa tilgongd.

### Óheft fíggjarumsiting og –ráðgeving fer fyri skeyti

Løgtingið hevur skipað landsbankan sum óheftan stovn, ið m.a. røkir gjaldføri og lántøku landsins. Landsbankin er samstundis einasti stovnur í landinum, ið støðugt greinar føroyska fíggjargeiran og búskapin sum heild. Verður gjaldførisumsitingin løgd til gjaldstovuna og harvið beinleiðis undir ræðið hjá

landsstýrismanninum í fíggjarmálum, er vandi fyri at onnur atlit enn faklig fara at gera seg galdandi, tá ið gjaldføri - fyri tíðina á leið 2.400 mió kr – skal plaserast.

Fíggjarstovnarnir í Føroyum eru, eins og í øðrum londum, týðandi fyritøkur, ið virka fyri vinnuligu áhugamálum sínum. Hesi eru mangan ikki samanfallandi við áhugamálini hjá samfelagnum sum heild. Hetta er ikki at undrast yvir. Hinvegin er alneyðugt, at tað almenna hevur dyggan førleika til at seta mørk, tá ið samfelagsligu áhugamálini verða gingin ov nær. Um løgtingið tekur undir við ætlanunum hjá landsstýrinum um at avtaka landsbankan, er stórur vandi fyri, at týdningarmikil førleiki fer fyri skeyti, og er hetta ikki til fyrimuns fyri tað almenna og búskapin sum heild.

Nevnast kunnu tvinni ítøkilig dømi um týdningin hjá politisku skipanini av at hava óhefta fíggjarumsiting og fakliga ráðgeving innan kjarnuøki landsbankans. Eina dømið er frá 2008, tá landsstýrið skuldi endurfíggja lán fyri umleið 1.000 mió kr. Sum kunnugt var fíggjarheimurin tá sera ótryggur, og var hugurin at keypa lánsbrøvini, sum landsbankin vegna landskassan gav út, avmarkaður. Í hesi støðu bar tó til hjá landsbankanum við tøka gjaldføri sínum at avmarka trupulleikan við at keypa lánsbrøv landskassans fyri upphædd svarandi til 500 mió kr. Tá ið ringasti ótryggleikin á fíggjarmarknaðin nakað seinni var avhasaður, kundi landsbankin selja hesi lánsbrøvini aftur. Annað dømi snýr seg um húsagangin hjá Eik og fyribils yvirtøkuni hjá Finansiel Stabilitet. Eftir ávíst trýst frá donskum myndugleikum og Finansiel Stabilitet, arbeiddi landsstýrið við ítøkiligum ætlanum um at yvirtaka kollsiglda bankan. Einasta óhefta fakliga greiningin og ráðgevingin tá kom frá landsbankanum. Flestum kunnugt mælti landsbankin staðiliga frá, at landsstýrið beinleiðis var við í ætlan um at yvirtaka Eik-bankan.

**Skipan av fíggjarumsiting fyri AMEG**

AMEG, ið er samhaldsføst eftirlønarskipan, sum myndugleikarnir og arbeiðsmarknaðurin varða av, hevur tørv á bæði fíggjar- og búskaparfrøðiligum førleikum. Neyðugt er eisini á hesum øki at halda fast við, at umsitingin av ognunum hjá AMEG framhaldandi er óheft av seráhugamálum, sum skiftandi landsstýri til tíðir umboða.

**Búskaparligur førleiki sundurskildur heldur enn savnaður**

Landsbankin hevur seinastu mongu árini ment vitan og mannagongdir sínar. Uppgávurnar verða røktar við servitan innan fíggjarvirksemi og búskapargreiningar. Gott samstarv er seinnu árini eisini fingið í lag við aðrar viðkomandi stovnar sum t.d. Danmarks Nationalbank, Hagstovu Føroya og Føroya Gjaldstovu. At skilja fíggjarligu og búskaparligu vitanina, sum savnað er í landsbankanum, frá hvørjum øðrum, kann gerast afturstig, sum kann gerast kostnaðarmikið fyri tað almenna og búskapin sum heild.

Landsbankin hevur áður, eins og landsstýrið ger vart við í uppskoti sínum, víst á fyrimunir við savnan av búskaparfrøðiligu vitanina á einum staði. Men við at niðurleggja landsbankan virkar landsstýrið fyri tí øvugta, tí við fyriliggjandi ætlan verða uppgávur og vitan skift út á trýggjar ymsar stovnar. Í fyrsta lagi verða starvsfólk landsbankans flutt í størv í Fíggjarmálaráðnum, har uppgávurnar verða at framleiða tilfar, sum undirstuðlar politikkinum, sum fíggjarmálaráðharrin stendur fyri. Í øðrum lagi skulu fólk flytast til gjaldstovuna, sum er stovnur, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eisini hevur ræði á, og sum tekur

sær av at reka KT-undirstøðukervi og roknskaparskipan fyri land og kommunur. Í triðja lagi hagstovuna, hvørs endamál er at savna, viðgera og almannakunngera hagtøl innan øll viðkomandi samfelagsøki. Verður tað álagt hagstovuni eisini at standa fyri búskapargreiningum, er vandi fyri, at tvístøða tekur seg upp um, hvussu greiningararbeiðið skal raðfestast í mun til hagtalsframleiðsluna. Somuleiðis tykist vandi vera fyri, at hagtalsframleiðsla, sum ikki beinleiðis hevur við búskapargreiningar at gera, fer at verða niðurraðfest.

Frægari loysn er at varðveita servitanina í landsbankanum og í nevndu stovnum. Samstarvið millum hesar teknisku stovnar eigur framhaldandi at verða útbygt, tó uttan at tey løgfrøðiligu skottini, sum eru millum stovnarnar, verða tikin burtur.

**Álit millum íleggjarar og onnur á føroyska búskapin**

Landsbankin hevur víst, at til ber at menna føroyska fíggjarmarknaðin, sjálvt undir sera truplum umstøðum. Dømi er her lánsbrævalántøkan, sum fingin varð í lag undir bankakreppuni í 90-árunum. Við hesum fíggingarhátti bar til at umfíggja skuldina til danska statin, og sum hevði stóra sparing við sær fyri landskassan.

Landsbankin framleiðir áhaldandi tilfar fyri at nøkta tørvin hjá íleggjarum – í stóran mun útlendskum – fyri vitan um gongdina í føroyska búskapinum. Hetta verður t.d. gjørt við prospektum, sum hava samband við lánsbrævaútgávu og í sambandi við árligu ratingina, sum Moody's ger av landsstýrinum. Verður landsbankin niðurlagdur, hevur landsstýrið eina avbjóðing í at tryggja, at trúðvirði er um búskaparhagtøl, -greiningar og metingar um búskaparlig útlit.

Sigurd Poulsen, stjóri